# – Akkurát sum ein dreymur



*Hóast báturin var væl fyltur við fólki, so lá hann púra javnur í sjónum – eisini fá ferð varð sett á. Í bátinum situr eisini Petur í Gong, sum hevur gjørt henda serstaka bátin*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Nýggi Koltursbáturin var sjósettur mánadagin. Báturin er eitt dømi um eitt eina føroyska framleiðslu út frá einum føroyskum hugskoti**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*

**Kvívík:** Møguleikin fyri flutningi til og frá Koltri er nú vorðin munandi betri.

Mánadagin fingu bóndahjúnini Bjørn og Lükka Patursson handaðan ein serbygdan plastbát við eina samkomu á havnalagnum í Kvívík. Hesin báturin, sum fekk navnið »Kolturs-báturin« verður hereftir álit teirra í sjóvegis sambandinum við umheimin.

Her er talan um ein plastbát sum er framleiddur í Føroyum. Umframt hetta megnar báturin at nøkta tann serstaka tørvin, sum bóndahjúnini hava fyri flutning av fólki, ferðafólki, farmi, kríatúrum og øðrum.

Og tað vóru eini sera fegin bóndahjún, sum tóku ímóti og royndarsigldu henda bátin av Bósa 20-slagnum á fyrsta sinni.

### Ein dreymur

– Vit eiga fólkið at gera ein slíkan bát í Føroyum. Og vit eiga vitanina um slíkar bátar her á landi. Hví ikki nýta hesa, tá vit skuldu hava ein bát til okkara tørv?, sigur Bjørn.

Ikki sørt errin kundi hann á fyrsta sinni seta teir báðar 60 HK stóru páhangsmotorarnar í gongd, og fara á fyrsta stimitúrin út frá havnalagnum í Kvívík henda seinnapartin.

– Hesin báturin er akkurát sum ein dreymur. Hann liggur púra rættur í sjónum, eisini tá vit settu ferð á, staðfesti hann aftaná royndartúrin og jomfrútúrin við Koltursbátinum.

Báturini varð sjósettur í Kvívík, har hann hevur fingið bæði motorar og nautisku útgerðini frá p/f Stubbanum í Kvívík.

Síðani ber leiðin til Kolturs, har hann fer at verða ein umráðandi táttur í røktini av oynni.

## Góð føroysk framleiðsla

**Havn:** Tað er s/pf. Plastsmiðjan á Heygnum Mikla sum hevur gjørt henda serbygda Koltursbátin.

Petur í Gong, sum hevur staðið fyri bygginini í samstarvi við m.a. Polyplast, sigur, at hann í mong ár hevur arbeitt við at umvæla bátar av líknandi slagi.

So við og við birtist í huga hansara ein ætlan um sjálvur at byggja ein slíkan bát. Um somu tíð fekk hann haraftrat at vita um aðrar menn, sum eisini gingu við sama hugskoti, m.a. Koltursbóndin sjálvur.

Soleiðis bar á, at Koltursbáturin kundi verða sjósettur mánadagin í Kvívík eftir at hava verið fyrireikaður í eitt longri tíðarskeið.

Petur í Gong væntar sjálvur, at enn fleiri slíkir bátar verða gjørdir í framtíðini.

– Meðan eg havi arbeitt við hesum serliga báti, hava nógvir mans víst hesum sera stóran áhuga. Teir hava spurt og fregnast óført, og tí er ikki óhugsandi, at hesin eini báturin fer at gerast til fleiri.

– Slíkir serbygdir bátar eru dýrir at innflyta. Og tí kunnu vit tað sama framleiða teir her á landi, og haraftrat fyri ein kappingarføran prís, staðfestir Petur í Gong, sum eisini var við til hátíðarligu løtuna í Kvívík.




## Starvsfólk til avgreiðsluna

Søkt verður eftir starvsfólki til avgreiðsluna hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

Arbeiði fevnir m.a. um:
- help-desk tænastur
- upplýsing um ferðslu
- leiðbeining í sambandi við netbókingar
- bílegging av ferðaseðlum og pakkatúrum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin
- hevur kunnleika til bókingarskipanir og ferðaseðlasølu.
- dugir at arbeiða við teldu
- hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Heidi Askham á tlf. 34 10 10 ella e-mail: heidia@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com